

## Leiðari til Badmintonhøllina

Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna, at byrja 1. august 2007 ella eftir avtalu.

Frítíðarskúlin er normeraður til 50 børn úr 1. og 2. flokki.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran og ítrótturin hevur stóran leiklut í gerandisdegnum
- møguleika at seta dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit vænta at tú**
- er útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum frítíðarskúla
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- sær møguleikar framum vansar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, ella Katrina Petersen, deildarleiðara, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar kommunu, 110 Tórshavn, í hendi innan 2. juli 2007.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

**Tórshavnar kommuna**

# LÆRARASTØRV
## í Leirvíkar Skúla

**Søkt verður eftir 4 lærarum skúlaárið 2007/2008**

Eitt fast starv fulla tíð.
Eitt starv fulla tíð, vegna lærara í farloyvi.
Eitt starv fulla tíð, vegna avlopstímar
Eitt starv uml. 24 tímar vegna stuðulstímar.
Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1 sept.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- Undir ábyrd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi
- Er fúsur at taka á seg tær uppgávur sum eru í skúlanum

**Vit vanta at tú ert**
- Fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- Virkisfús/ur og Hugað/ur fyri toymissamstarvi
- Í samstarvið við leiðsluna og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan

Harumframt skulu lærararnir hava førleika at undirvísa í onkrum av hesum lærugreinum: Føroyskum, donskum, evning, kristni, ítrótti, smíð, tónleiki, handarbeið/evning, støddfrøði og serundirvísing, smíð ella tónleiki.

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving og linjulestur í onkrari av nevndu lærugreinum. Royndir úr føroyska fólkaskúlanum. Læraralesandi, sum taka prógv í summar kunnu einsi søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambart avtalu millun Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera fyrstalæraranum, Fríðfinni Johnsson í hendi í seinasta lagi 18. juni 2007 kl. 18.00

Áhuga kunnu verda sær til Leirvíkar Skúla, tlf. 443234 ella 743234 og spyrja eftir Fríðfinni Johnsson.

**Leirvíkar Skúli** hevur komandi ár uml. 95 næmingar og 9 lærarar. Skúlin er ikki árgangsbýttur í øllum árgangum. Tú kanst lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.skulin.fo/lei

SINNISBATI

# Opið hús á “lukkaðari deild”.

**Fyrilestrar um depressjón og um “lívið við alkoholismu og depressión”**

Sunnudagin 17. juni kl. 14 – 16 bjóðar Psykiatriski depilin áhugaðum at koma inn og hyggja seg um á lukkaðu deild (deild 2) á Landssjúkrahúsinum.

Ikki bara er hetta fyri at gera eina innlegging á lukkaðari psykiatriskari deild minni duldarfulla, men eisini at signalera, at tíðin er komin at bróta niður tabu viðv. sálarligari sjúku.

Kl. 16 sama dag bjóðar Sinnisbati til áhugaverdar framløgur í Veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum. Tormóður Stórá, leiðandi lækni á Psykiatriska deplinum, heldur fyrilestur um depressjón, og Regin Jóanesarson greiðir frá, hvussu tað var at liva við alkoholismu og depressjón.

Til seinast verður tónleikur at hoyra við bólkinum á Psykiatriska deplinum “Menniskja”, og okkurt verður til matna.

# Leiðari til Musikkskúlan í Suðuroy

Musikkskúlin í Suðuroy søkir eftir leiðara.

**Musikkskúlin væntar at umsøkjarar skulu:**
- hava kunnleika til musikkskúlaarbeiði
- vera kveikjandi
- duga at skipa fyri
- hava góð samstarvsevni

Setanartíðarskeið: 1. august 2007 – 31. juli 2009

Løn eftir avtalu, ið skal góðkennast sambært § 5 stk. 5 í kommunustýrislógini.

Umsóknarfreist: 2. juli 2007

Musikkskúlin í Suðuroy er partur av føroysku musikkskúlaskipanini.

Umsókn skal sendast til:

**Musikkskúlin í Suðuroy**
v/Elin Nielsen · 870 Fámjin

# Frá Heilafelagnum

Um nóg stór undirtøka verður, skipar Heilafelagið fyri útferð til Gásadals
**sunnudagin 24. juni 2007**
Døgurði á Hotel Vágum.

Kostnaður 200 kr. - gjaldst skal við fráferð

Farið verður frá MBF-húsinum, Íslandsvegur 10, Tórshavn kl. 10.00.

Tekning á tlf. 317554 í seinasta lagi týsdagin 19. juni kl. 12.00

**Nevndin**